gult cyan magenta svart

Kavingin liðug

Teir eru nú givnir á hesum sinni at kava niður til Jólaskipið í Fugloyarfirði. Líkindi vóru ikki at kava hósdagin, og donsku kavararnir fóru aftur til Danmarkar í gjár

Heri Andreasen við nøkrum av bjargaðu lutunum
Mynd: Edvard Joensen

EDVARD JOENSEN

Tað komu ikki fleiri lutir upp av Jólaskipinum, enn teir, sum funnir vórðu mikudagin. Hósdagin vóru ikki líkindi hjá kavarunum at fara niður, og nú eru teir farnir aftur til Danmarkar.

Eftir góða úrslitið mikudagin var við góðum treysti farið avstað aftur hósdagin at royna at fáa fleiri lutir upp.

Veðrið var eisini gott, og streymurin ikki harðnaður meira enn so, at væl hevði borið til at farið niður. Men aldan var í hægra lagi, og kavararnir gjørdu av at avlýsa. Tað er nevniliga ikki heilt vandaleyst at kava á stórum dýpi í høgari aldu. Tað er sera tungt at koma uppaftur, og teir taka eingi óráð fyri, tá um lív og heilsu ræður.

Tá Tíðindablaðið Sosialurin hevði Dragaberg, sum virkar sum støð hjá teimum í Fugloyarfirði, í telefonini seinnapartin hósdagin, vóru teir í ferð við at rigga av. Boyur, standarar, fortøjningar og tílíkt skuldi fáast til hús aftur.

Seinni seinnapartin var samkoma í Hvannasundi, har kavaraliðið hevur hildið til, meðan teir hava verið her. Hóskvøldið var samkoma í Havn fyri teimum, sum við hava verið.

Verkætlanin hevur kostað einar 200.000,- krónur, er upplýst. Um roynt verður aftur seinni, er púra óvist. Men er onkur, sum hevur hug at lata pening til eina nýggja roynd, er ikki óvist, at hugurin hjá kavarunum er til staðar, skiltist á onkrum av luttakarunum í Fugloyarfirði mikudagin.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Útbygging á Vestsalmon

Á kryvjivirkinum Vestsalmon í Kollafirði byggja tey út fyri einar 14 milliónir krónur í ár. Umframt hevur Vestsalmon keypt pakkhúsið hjá Kollafjarðar Kommunu, meðan kommunan hevur keypt Salmex-bygningin frá Vestsalmon

Samlaða útbyggingin av Vestsalmon í ár fer at kosta umleið 14 milliónir kr.
Mynd: Jens K. Vang

EDVARD JOENSEN

Vestsalmon verður bygt út fyri einar 14 milliónir krónur í ár. Talan er um størri frystiorku, vaskimaskinu og blóðgikar.

Stóra útbyggingin, sum er í gongd í løtuni, er ein nýggj høll til frystingina. Frímund Hansen, stjóri á Vestsalmon, sigur, at hendan útbyggingin fer at økja frystiorkuna við eini helvt. Frá 20 tonsum um samdøgurði til 30 tons.

Tað er soleiðis í dag, sigur Frímund Hansen, at tey klára at frysta 20 tons um samdøgurði í tveimum skiftum. 10 tons hvørja ferð. Tað er ov lítið, sigur hann, so nú verður bygt út, soleiðis at orkan veksur við eini helvt til 30 tons um samdøgurði, sum kunnu frystast í einum. Útbyggingin er gjørd soleiðis, at til ber at tvífalda frystiorkuna seinni.

Frímund Hansen sigur, at tað var vorðið ov trongligt á virkinum, har arbeitt varð bæði feskt og fryst. Tí hava tey bygt hendan nýggja bygningin uppí úteftir. Hesin bygningurin økir gólvvíddina við 800 fermetrum, sigur hann.

Tað er partafelagið Bulur í Kollafirði, sum ger arbeiðið. íløgan fer at liggja um 10 milliónir krónur.

Eisini hevur Vestsalmon gjørt íløgu í eina vaskimaskinu at vaska kassar við.

Økið, sum var opið millum gamla Blue North og pakkhúsið hjá kommununi er innilokað, og har er nýggja vaskimaskinan sett upp. Hendan íløgan er upp á eina tvær milliónir krónur, sigur stjórin á Vestsalmon.

Eisini verður nýtt blóðgikar sett upp á Vestasalmon, sigur Frímund Hansen. Eisini hetta er ein íløga upp á eina tvær milliínir krónur. So alt í alt ger Vestsalmon íløgur fyri einar 14 milliónir krónur í ár.

Umframt allar hesar íløgurnar hevur Vestsalmon eisini keypt reyða pakkhúsið við síðuna av virkisbygninginum frá Kollafjarðar Kommunu. Í staðin hevur kommuna so keypt bygningin, Vestsalmon átti ytri á havnarlagnum, Salmex bygningin. Her hevur Vestsalmon goldið ein prís ímillum, sigur Frímund Hansen, men vil ikki siga, hvussu nógv tað er.

Kollafjarðar Kommuna er í ferð við eina størri havnarútbygging uttan fyri Langasand. Har skal millum annað nýggja frystihotellið standa.

Byggja út í Gøtu

Smiðjan hjá Normek í Norðragøtu hevur næstan trífaldað gólvvíddina, nú nýggj høll er sett upp

Normek hevur meira enn tvífaldað gólvvíddina *Mynd: Jonhard Hammer*

EDVARD JOENSEN

Gólvvíddin hjá Normek í Norðragøtu vaks frá 300 fermetrum til 800 fermetrar, nú nýggja høllin varð sett upp.

Robert Langgard, stjóri á Normek, sigur, at har var vorðið ov trongligt í smiðjuni. Tí varð hildið neyðugt at byggja uppí.

Teir keyptu eina høll í Danmark, sigur Robert Langgaard. Síðan fóru teir sjálvir til Danmarkar og tóku høllina niður, fluttu hana til Norðragøtu og settu hana upp aftur her. Men teir hava tó stytt hana nakað. Nú er hon 25 metrar til longdar, meðan hon var 30 metrar, tá hon stóð í Danmark.

Robert Langgaard sigur, at tað kostar teimum góða hálvaaðru millión krónur, sum nú er gjørt.

Normek ger alt vanligt umvælingararbeiði, sigur Robert Langgaard. Tað er tó næstan bara fyri skip, teir arbeiða. Alt frá stálarbeiði til hydraulik og hvat tað nú kann vera.

Maskinumvælingar hava teir tó ikki átikið sær enn, tá talan hevur verið um stór skip. Men smærri motorar hætta teir sær tó væl undir, sigur hann.

Hann metir, at umleið 90% av tí arbeiði, teir gera, er skipsumvælingar av ymsum sløgum. Og talan er í fyrsta lagi um skip úr økinum, sigur hann. Tað vil siga Gøtu, Leirvík, Skálafjørðinum og har um leiðir.

Robert Langgaard er bjartskygdur. Annars hevði hann ikki farið undir hesa útbygingina, sigur hann. Men hann tekur tó aftur í aftur, at hon var neyðug.

Tá smiðjan byrjaði fyri hálvumfjórða ári síðan, vóru teir tveir mans, sigur hann. Nú eru 16 mans regluliga til arbeiðis har. Og teir hava nokk at gera, letur hann at. Tað eru bara føroyingar, sum arbeiða hjá Normek.

Robert Langgaard, stjóri á Normek, sigur, at teir hava gingið og spælt sær við tankanum um at fara undir einahvørja nýggja framleiðslu. Men enn er einki so ítøkiligt, at hann vil siga nakað meira um tað.

gult cyan magenta svart

Nor›oyingar skulu fyrireika seg til tunnil

Borgarstjórin í Klaksvík heitir á vinnuna, mentanarlívi› og handilslívi› í Nor›oyggjum um at fyrireika seg til fasta sambandi›, sum kemur um Leirvíksfjør›

EY›UN KLAKSTEIN

– Undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjør› fer at skapa n‡ggjar møguleikar í Nor›oyggjum, men hann fer eisini at seta stór krøv til handilslívi›, vinnuna, mentanarlívi› og fólki› annars í Nor›oyggjum.

Hetta sigur borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan vi› Keldu, sum hevur veri› og er ein av heitastu fortalarunum fyri einum undirsjóvartunnili millum Eysturoy og Bor›oy.

Eftir at sáttmálin um at gera tunnilin um Vestmannasund var› undirskriva›ur hósdagin, tykist ein undirsjóvartunnil um Leirvíksfjør› at vera nærri enn nakrantí›.

Landsst‡risma›urin vi› samfer›slumálum hevur mælt til at gera ein undirsjóvartunnil um Leirvíksfjør›, og landsst‡risma›urin vi› fíggjarmálum hevur sett fasta sambandi› um Leirvíksfjør› á 10 ára longu verklagsætlanina, sum hann ger í løtuni. Ætlandi ver›a pengar eisini settir av til forkanningar næsta ár.

Í samgonguskjalinum stendur eisini ni›urfelt, at kanningar av undirsjóvartunnlinum um Leirvíksfjør› skulu halda fram, og andin í tí or›ingini er, at mi›jast skal fram ímóti føstum sambandi.

Mugu kappast á jøvnum føti

Borgarstjórin í Klaksvík heldur, at arbei›i› upp á undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjør› skal byrja so skjótt sum ta› er li›ugt at bora um Vestmannasund, og at hetta arbei›i› helst skal fara í gongd seint í 2003 ella tí›liga í 2004.

– Samfelagi› er útbygt solei›is, at vit mugu fáa fast samband vi› meginøki›, so vit kunnu kappast á jøvnum føti, sigur Jógvan vi› Keldu.

– Um vit ikki fáa ein undirsjóvartunnil, so kemur ta› at kosta í seinasta enda, tí ta› sjóvegis samband, sum í løtuni er millum Klaksvík og Leirvík, fer at for›a fyri frambur›inum í Nor›oyggjum, sigur hann.

Borgarstjórin í Klaksvík sær fyri sær eitt økt samstarv millum Klaksvík, Leirvík, Gøtu og Fuglafjør›, eftir at fasta sambandi› er komi›.

– Hetta er eitt sterkt og sunt øki, sum hevur nógvan útflutning, og vi› einum undirsjóvartunnli eru stórir møguleikar fyri at menna hetta øki og tryggja frambur›in, sigur Jógvan vi› Keldu.

Ungdómurin stø›ast

Um ein undirsjóvartunnil ver›ur gjørdur millum Klaksvík og Leirvík, fara ta› at búgva 14.000 fólk innanfyri eitt øki, har ta› eru 35 minuttir at koyra frá ø›rum endanum til hin, og ta› fer at skapa øktar møguleikar hjá handislívinum og mentanini í økinum.

– Ta› er umrá›andi at fólki› í Nor›oyggjum fyrireikar seg til undirsjóvartunnilin, so vit vera til rei›ar at taka kappingina upp vi› meginøki›. Og vit skulu eisini hava politikarar, sum tora at taka avger›ir og at skapa naka›, sigur Jógvan vi› Keldu.

Gongdini í fólkatalinum seinastu fimm árini vísir, at meginøki› veksur skjótari enn Nor›oyggjar og Vágar, og b‡rá›sforma›urin heldur, at tann gongdin fer bara at halda fram og gerast t‡›uligari, um eingin undirsjóvartunnil kemur.

– Ungdómurin í Klaksvík vil gjarna búgva her, um hann hevur møguleikar fyri at arbei›a og virka her, og vi› einum undirsjóvartunnli kunnu vit skapa grundarlag fyri framhaldi› trivna›i og frambur›i í okkara øki, sigur hann.

Ta› tekur væntandi tr‡ ár at gera undirsjóvartunnil um Leirvíksfjør›.

Eingir pengar til landsst‡rismann

Fíggjarnevndin vísti í gjár aftur umbøn frá løgmanni pengar til løn til Tórbjørn Jacobsen. Heini O. Heinesen er sera misnøgdur vi› atbur›in hjá fíggjarnevndarformanninum í hesum máli

EIRIKUR LINDENSKOV

Enn er ógreitt, hvussu ver›ur vi› lønini hjá Tórbjørn Jacobsen, sum Tjó›veldisflokkurin fríggjadagin í sí›stu viku innstilla›i til n‡ggjan landsst‡rismann eftir Signar á Brúnni

Løgma›ur hevur gjørt greitt, at hann fer ikki at seta n‡ggjan landsst‡rismann, fyri enn lønarvi›urskiftini eru greidd. Og ta› ver›ur ikki fyrr enn 1. oktober um ikki løgtingi› játtar pengarnar. Til 1. oktober fær Signar á Brúnni bæ›i landsst‡rismannaløn, koyripengar og bor›fæ, sum Tórbjørn Jacobsen annars skuldi fingi›.

Tórbjørn Jacobsen hevur kortini sagt, at hann fegin fer í landsst‡ri›, fær hann løn ella ikki.

Á fíggjarnevndarfundi gjáramorgunin vísti nevndin umbøn frá løgmanni aftur um at fáa pengarbar til lønina.

Ójøvn lønarvi›urskifti

Rættuligar stórar broytingar vór›u í fjør gjørdar í lønarvi›urskiftunum hjá løgtingsmonnum. M. a. hækka›i grundlønin úr umlei› 16.000 krónum upp í 25.000 krónur umframt koyripening og eitthvørt ískoyti.

Men ta› er tó stórur munur á at vera valdur tingma›ur og at sita sum tingma›ur fyri ein landsst‡rismann. Hetta mátti Tórbjørn Jacobsen sanna, tá hann misti sæti á tingi, tá Signar á Brúnni aftur gjørdist tingma›ur.

Sum tingma›ur fekk Tórbjørn lønina goldna frammanundan. men tá hann reyk úr tinginum tann 23. mars steg›i lønin vi› brestin og hann var› bi›in um at gjalda 23.000 krónur aftur.

Me›an strí›i› stendur um at finna pengar til lønina hjá Tórbjørn Jacobsen, fær Signar á Brúnni løn sum tingma›ur, løn sum landsst‡risma›ur, koyripengar sum tingma›ur, koyripengar sum landsst‡risma›ur og bro›fæ sum landsst‡risma›ur, tilsamans sum einar fimm arbei›smannalønir.

Minnilutaverjan nóg miki›

Ta› er nógmiki›, um tveir av fimm fíggjarnevndarlimum vísa slíkari umbøn aftur, sum hana frá løgmanni um pengar. Hetta var eisini ta›, sum hendi, hóast fíggjarnevndarforma›urin, Bjarni Djurholm ikki var á fundi.

Men Heini O. Heinesen er sera misnøgdur vi› framfer›ina hjá fíggjarnevndarformanninum.

Hann úttalar seg um hetta máli› í blø›unum og sigur, at umbønin helst ver›ur sent løgmanni aftur. Hetta haldi eg vera sera løgi, tí hann skapar løgmanni trupulleikar. Hetta er ikki ein spurningur um persónar – men ein spurningur um, at Tjó›veldisflokkurin fær sín landsst‡rissess manna›an, sigur Heini O. Heinesen.

Heini O. Heinesen heldur ta› eisini vera sera løgi, at Bjarni Djurholm skal gera so nógv burtur úr hesum málinum – og vísir á stø›una, tá Jørgen Niclasen var› settur í landsst‡rissessin hjá John Petersen.

Tá var ta› eingin, sum tosa›i um nakra eykajáttan, og fíggjarnevndin var› als ikki spurd, sigur hann.

Heini O. Heinesen gevur eisini Bjarna Djurholm skuldina fyri, at Signar á Brúnni kom so illa fyri sí›sta summar, at hann nú var› noyddur at leggja frá sær.

– Tá setti Bjarni Djurholm seg hart ímóti at geva eykajáttan, solei›is at Sjónvarp Føroya kundi gjalda starvsfólkinum løn. Hesa ábyrgd tók Signar á Brúnni á seg – og mátti so lí›a á henda hátt fyri ta›. Hev›i Signar á Brúnni ikki goldi› pengarnar, so hev›i veri› svartur skíggi í SvF sí›sta summar – og so hev›i Signar á Brúnni ikki sett seg sjálvan í vanda, sigur Heini O. Heinesen.